# Heri Nolsøe mynstrar av í Eik



Væl kendi havnarmaðurin, 60 ára gamli bankamaðurin Heri Nolsøe, byrjaði í fyritøkuni sum 17 ára gamal, og hevur nú sagt Eik Banka farvæl eftir 43 ára trúgva tænastu

„Takk fyri tíðina, Heri“, sigur Ann Lindberg, leiðari fyri móttøkuna á deildini hjá Eik í Sverrisgøtu í Havn. Eitt av teimum væl kendu andlitunum í Eik Banka verður frameftir ikki at síggja í bankanum. 60 ára gamli Heri Nolsøe hevur mynstrað av eftir samfull 43 ár í tænastu bankans.

Hetta varð markerað við einum hugnaligum hátíðarhaldi og móttøku mánadagin 14. desember í høvuðssætinum Yviri við Strond, har heilt fitt at starvsfólki var samankomið at heilsa upp á Hera Nolsøe.

Báðir stjórarnir í Eik Banka, Marner Jacobsen, forstjóri, og Bjarni Olsen, stjóri, heilsaðu Hera við røðum og takkaðu honum fyri tíðina í Eik.

Marner Jacobsen, sum í sínari tíð var í starvi á KT-deildini, har Heri Nolsøe var leiðari fleiri ár, nevndi, hvussu Heri longu fyri mongum árum síðani var við til at menna KT-skipanir í bankanum og innan føroyska bankakervið.

- Hesar skipanir munnu hava verið dygdargóðar, tí fleiri teirra virka dagin í dag, segði Marner Jacobsen.

Heri Nolsøe, ið byrjaði í táverandi Føroya Sparikassa sum 17 ára gamal, er fram um alt eitt kreativt menniskja við góðum evnum sum yrkjari og tónasmiður. Tí fekk hann ein væl ljómandi guitar í fráfaringargávu frá Eik.

Hugnaliga hátíðarløtan endaði við, at Heri spældi undir, meðan gestirnir sungu tveir sangir, ið Heri hevur yrkt og gjørt lag til. Annar teirra er ein vakur jólasangur, ið hóskaði væl til árstíðina.

*Kelda: eik.fo*

# Ikki Jóhan men Jóannes

*Annfinn Danielsen*

**Rætting til myndinar í greinini Leivur Ejdesgaard: Pápin Niels stovnaði B36. Hjá Óli Jacobsen: "Hendur ið sleptu" Nr. 277, 26. novembur 2009.**

**Av tí at ein villa hevur snýkt seg inn frálíku frásagnirnar hjá Óla, loyvi eg mær at koma við hesum rættingum til myndirnar.**



Á myndini frá 1936 av B.36 móti verjuskipunum, er eitt navn, **Arnold Dahl Christiansen**, sum situr fremst og mitt í myndini, blivið burtur. Hann stendur heldur ikki í minnisritinum hjá B36.

B36-arnir í svørtum eru tískil hesir aftast frá vinstru: Ejdesgaard, dómarin Jampan, Niss Hansen, Eivind Mouritsen, Djóni Ziska, Richard Næs og Niels Juel Háberg. Fremst frá vinstru: Emil hjá Gøtu-Jákupi, Jákup Ki ( hvítari blusu), Mortan Mørk, Arnold Dahl Christiansen, Napoleon Nolsøe, Ullaba Askham.



Á seinnu myndini, tí samansetta liðið av B36 og HB ið vann á einum bretskum oyðara, er eisini ein lítil rætting.

Tað er ikki Jóhan Simonsen, men **Jóannes (hjá Hanusi í Skálavík) Simonsen**, sum í dag er 91 ára gamal, sum stendur sum tann 4. í aftaru røð.

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Dagurin**

16. desember. Lázarus. Vinmaurin í Betania, sum Jesus vakti upp frá deyðum (Jóhs. kap. 11). Ein halgisøga sigur, at hann seinni doyði friðarliga, ein onnur at hann varð hálshøgdur undir Domitianus keisara.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*